# borð á gomlu Norrønu




*Soleiðis sær kunningardiskurin út í dag*



*Eyðun og Helen Joensen úr Runavík eiga nógv spor umborð á Logos Hope*

*Mynd: Sunniva Østerø*



*Trúgva Petersen úr Gøtu er 2. stýrimaður*



*Erling Sørensen, inspektørur frá Lloyds, Onni Hytti, maskinmeistari úr Finnlandi og Uni Nolsøe, skipari*

Í januar í 2008 tók eg avgerðina, at nú skuldi tað verða, og eg havi tikið mær eitt ár at verða við umborð.

Uni undirstrikar, at talan hevur verið um eitt gott ár, helst tað besta í lívinum hjá honum. Uni útihýsir ikki, at hann fer at taka eitt annað tørn fyri OM í framtíðini. Tað hevur verið so óheppið hjá Una, at hann hevur ikki verið staddur heima í Føroyum, tá hini OM-skipini hava vitjað landið. So hann hevur ikki havt høvi at sæð hini OM-skipini. Uni fegnast um, at tað eru aðrir føroyingar umborð, tí tað er altíð nakað serligt at kunna práta føroyskt umborð.

## Fimm ár við OM

Á brúnni hitta vit eisini Trúgva Petersen úr Gøtu, sum er 2. stýrimaður. Trúgvi hevur verið við OM í 5 ár. Trúgvi hevur tó ikki verið við fimm ár í einum. – Eg var fyrst við Doulos í hálvtannað ár, og so vóru eg og konan umborð á Logos 2 í eitt knapt ár. Sum familja vóru vit við Logos 2 í gott tvey ár, og nú hava vit starvast umborð her, síðani juni mánað í 2008.

Trúgvi hevur vitjað mong lond í OM-tænastuni. Hann er givin at telja, men veit kortini at siga, at talið er farið væl upp um tey hálvthundrað. Spurdur hví hann og konan Bjarta, sum er ættað úr Runavík, valdu at fara við OM, svarar Trúgvi:

– Fyrst og fremst, so kendu vit tað sum eitt kall, og at tað var ein røtt avgerð at fara umborð. Síðani hevur ein sæð, at ein kann gera mun umborð, og gera gagn av sínari útbúgving. Bjarta kann eisini hjálpa hinum kvinnunum umborð, serliga teimum yngru kvinnunum, har hon kann hjálpa teimum á leiðuni. So tað eru uppgávur umborð at fylla hjá okkum, og vit kenna, at tað er rætt at vera her enn, og tí halda vit fram við tænastuni umborð.

## Serligur uppvøkstur

Tey trý børnini hjá Trúgva og Bjartu hava ein serligan uppvøkstur umborð á Logos Hope.

– Tað er sjálvandi ein heilt onnur verð, enn at vera heima í Føroyum. Her umborð eru 350 fólk, mest ungfólk, og tey koma í tætt samband við hesi ungfólkini. Børnini óttast ikki fyri at práta við fremmand fólk. Umborð á Logos Hope er bæði skúli og barnagarður, so tað hevur ein serliga dám fyri Sámuel, Elisu og Páll, sum fáa sæð nógv av verðini.

Børnini eru longu stinn í enskum, og fimm ára gamli, Sámuel er longu farin í holt við at læra seg spanskt, so útlit eru fyri, at børnini hjá Trúgva og Bjarta gerast sannir málfrøðingar.

## Kann ikki sammetast

Trúgvi heldur, at talan er um betri og størri umstøður umborð á Logos Hope, mett við tað hann hevur roynt umborð á Logos 2 og Doulos.

– Logos Hope er ikki rættiliga at sammeta við hini bæði skipini. Umstøðurnar vóru nógv smærri umborð á Doulos og Logos 2, og her er talan um eitt størri skip. Sjálvandi hevur ein serligar kenslur fyri hesum skipinum, tí ein kennir tað frá fyrr av. Ein veit hvat tað hevur verið brúkt til, og ein hevur sjálvur ferðast við skipinum áður.

Trúgvi metir, at reint vinnuliga fær hann nógvar virðismiklar arbeiðsroyndir umborð á Logos Hope. – Serliga hetta, at vit eru so nógvar tjóðir umboðaðar umborð. Ein sær og upplivir ymiskar hættir at gera tingini uppá, og ymiskar hugsunnarhættir. So ein lærir nógv av tí, eisini hvussu ein skal fara við fólki. Ein upplivir sera nógv ymiskt.

## Gleðir seg nógv

Trúgvi dylur ikki, at hann gleðir seg til løtuna, tá gamla Norrøna aftur stevnir inn á Havnarvág. – Tað verður nakað heilt serligt. Eg var sjálvur við Logos 2, tá hon legði at á Tvøroyri, og tá var tað ein heilt serlig kensla at koma til Føroya. Tað gleðir Trúgvi seg almikið til. Trúgvi veit ikki at seta áramál á, hvussu nógv ár hann og Bjarta verða við Logos Hope. – Lat okkum bara siga sum so: Vit taka eitt ár í senn.

**Hoyr innsløgini, sum vóru gjørd umborð á Logos Hope á Rás2, mánamorgun 30. mars**